SmartStep.fo

**Tann vælumtókti**

**Hansen e-handil til sølu**

**Internethandilin liggur klárur á internetinum, og er klárur at nýta. Allar tær mest vanligu matvørurnar, ið hoyra til ein matvøruhandil, finnast her. Myndir eru eisini av hvørjari vøru!**

**Smartstep.fo**
**448104, 218104**
**smartstep@smartstep.fo**

# Søkt verður eftir fólki til skaða- og tryggingardeildina

Starvið er í høvuðsheitinum at sýna skaðar á akfør og farm.
Eisini skal viðkomandi gera upp og hava eftirlit við møguligum umvælingum av skaðum.

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at sýna og umvæla skaðar, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum.
Alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

**SMYRIL LINE**
att.: stjórnin
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

# Egnarir

Søkt verður eftir accord egnarum, at byrja beinanveg.

**Tlf. 444385, 444409 ella 289435**

# Starvsfólk

## til Dagrøktina í Runavíkar Kommunu

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu at arbeiða 30 tímar um vikuna.

Í Dagrøktarskipanini eru 90 børn og 21 dagrøktarmammur.

Vit ynskja at tú ert kreativur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum. Arbeiðið verður í størstan mun skipað út frá spælistovuni.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 44 8594.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 20/09-2002.

**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará

Runavíkar Kommuna

# Ístaðin fyri at keypa nýtt



Vit lakera alt innbúgv, so tað verður sum nýtt.

Skápshurðar og innhurðar

Ein bíligari loysn

**Auto-Tek**
Argjaboðagøta 5 · Tlf. 321206 · fax 321236 eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

# Fólk søkist

til fast starv til kvøldið og vikuskiftini.

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
mánadag-hósdag 19.00-23.30
fríggjadag, leyg- og sunnudag 13.00-19.00

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 311060

frants restorff

# Goymslulærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna (Nissan, Opel, Saab, Peugeot).

Førleikakrøv: FHS, HH, HF ella studentsprógv. Koyrikort krevst.

Skrivlig umsókn til
**P/f Meinhardt Arge**
Boks 3171
110 Tórshavn
Tlf. 345400

# »Víkingur« 800

Siglir 26 míl, kann fara longur.
Fiskar betri
Góðskan í topp.



Áhugaðir, vendið tykkum til

**Oddmar Juul Samuelsen**
Postboks 23 – 110 Tórshavn
Telefon 31 86 49 og 22 90 88

# Útbjóðing

Hervið bjóðar Skála Kommuna arbeiðið út, í almennari licitatión, at gera nýggjar gøtulyktir í Skálafirði.

Arbeiðið umfatar kaðalgrøv, mastrafundamentir, tyrving av kaðalum og mastrastøði.

Útbjóðingartilfarið fæst við at gjalda kr. 2.000,00 á konto nr. 1562918 í P/f Føroya Banka.

Tilboðini skulu sendast ella latast Skála Kommuni í afturlatnum brævbjálva, merktur

**»Gøtulyktir«**

Innkomin tilboð verða latin upp á Kommunuskrivstovuni mánadagin 20.09.02 kl. 14.00, og kunnu teir sum bjóða, verða hjástaddir tá tilboðini verða latin upp.

Skála Kommuna skilar sær rætt til at velja millum innkomnu boðini ella onki at taka.

**Skála Kommuna**
480 Skáli

**Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM**

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Skeið í roknskapi og skatti

**Endamál:** At læra um grundleggjandi hugtøk innan roknskap og hvussu ein verður uppsettur.
At læra um grundleggjandi hugtøk innan skatt og mvg.

**1. dagur: Roknskapur**

**Innihald:**
- Virkishættir og møguleikar
- Almennar reglur: Bókhald, skattur, mvg
- Uppsetan av roknskapi
- Innihald í rakstri
- Innihald í fíggjarstøðu
- Arbeiðið við serligum roknskapum (case-arbeiði)

**2. dagur: Skattur og mvg**

**Innihald:**
- Virkishættir og møguleikar (endurtøka)
- Almennar reglur: Bókhald, skattur, mvg (endurtøka)
- Skattligar reglur (skattalógin v.m.)
- Munur millum skattaroknskap og ársroknskap
- Mvg-lógin
- Arbeiðið við serligum roknskapum (case-arbeiði)

**Tíðarskeið:** 10. og 12. spetember 2002 kl. 17.15-20.30
**Stað:** Føroya Handilsskúli, Tórshavn
**Kostnaður:** 1.750,00 kr. íroknað frálæru, tilfar og mat.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

# Pedagogar ella hjálparfólk

## til Sambýlið í Stoffalág 64 í Havn

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Sambýlinum í Stoffalág 64 í Havn er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. oktober 2002 ella eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett eftir sáttmálum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag fyri tænastumannasettar pedagogar, lønt eftir lønarstiganum 24-31 eftir lønaravtaluni frá mars 2002.

Sambýlið í Stoffalág 64 er eitt nýstovnað sambýlið, sum verður heim hjá fimm menningartarnaðum ungfólkum.

Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum verða at taka sær av íbúgvunum og øllum øðrum arbeiði í heiminum. Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarar hava fakliga vitan og eru áhugaðir í at útbúgva seg meira. Hava góð samstarvs- og innlivingarevni, eru kroppsliga væl fyri og ikki bangnir fyri at taka tøk.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv verða sett sum pedagogar, men um ikki pedagogur verður settur, so verður starvið sett tíðaravmarkað við hjálparfólki, sett eftir hjálparfólkasáttmálanum.

Nærri fæst at vita um størvni frá Marjuni á Plógv, leiðara á telefon 314664. Umsóknarfreistin er 21. september 2002 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið í Softalág 64**
Att. Leiðarin
FO-100 Tórshavn

## Søkt verður eftir
# eftirlitsleiðara
## (space controller) til ferðamannadeildina

Starvið er í høvuðsheitinum eftirlit við bókingarskipanini:

1. Kømurum og koyggjum
2. Bildekk, nøgd og slag av akførum
3. Bólkabókingar
4. Fundarvirksemi
5. Matbókingar (pláss í matstovum)

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at handfara tøl, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum, merk brævið »eftirlitsleiðari«, alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

P/F SMYRIL LINE
att.: stjórnin
Postboks 370
110 Tórshavn

**SMYRIL LINE**
**Tel. +298 345900**

# Sethús til sølu

Sethúsini Óluvugøta 12 verða við hesum lýst til sølu.

Grundøkið er 806 m2. Húsini eru totalrenoverað í 1997. Uttanumøkið er gjørt m.a. við tveimum glasvøllum.

Innrættaða gólvvíddin er 222 m2 í 2 hæddum og lítil kjallari. Til sethúsini hoyrir bilhús og carportur.

Húsini eru í góðum standi og eru innrættaði soleiðis:

Á 1. hædd eru 2 gangir, 1 stórur køkur, 1 stór stova, 1 wc v/ brúsu og 3 verilsir.

Á 2. hædd er ein stór gongd, 4 verilsir og 1 wc v/ brúsu.

Stórt ovastaloft, ið er gólvbelagt.

Áhugaðir keypanir kunnu síggja ognina eftir avtalu við undirritaða, sum somuleiðis eisini kann geva fleiri upplýsingar um hetta ynskist.



Nærri fæst annars at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Fríða Patursson, adv.

# Stoypijarnsketil til sølu

**Merki:** Tasso
**Árg.:** 1994
**Typa:** T4 8 bar – 37,5 kw

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.:Signar Olsen
tlf. 22 05 28 ella 34 56 63

# Norðoya Javnaðarfelag

Lýsti aðalfundurin er útsettur til 10. september kl. 20.00 í Bøgøtu 3.

**Nevndin**

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaraskránna til setan so skjótt sum gjørligt. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, ið er skipað sum eitt 1/2 ársverk.

**Uppgávur:**
Landsstýrismaðurin í Vinnumálum fer ætlandi í næstum at áseta, at øll prutl skulu skrásetast. Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki til hesa uppgávu. Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Framleiðslu og útflyggjan av nummarspjøldrum
- Eftirkanning av kravdum skjølum
- Kunning av viðskiftafólki um átakið

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetananin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráðir.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosað við Jákup Jacobsen, stjóra. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. september 2002.

**BILEFTIRLIT FØROYA**
**Hoyvíksvegur 57**
**Postsmoga 3206**
**FO-110 Tórshavn**

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kunningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólko koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskrásetingina og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*

**Vegna skeiðvirksemi er handil okkara stongdur frá fríggjadegnum 06.09.2002 til og við týsdagin 16.09.2002**

**Átrokandi boð kunnu sendast á fax 318101 ella ringjast á tlf. 312676 aftaná kl. 17.00**

**A. H. Jensen**
alt innan reingerð
Stoffalág 25 · tlf.: 322676 · fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo